Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 12.12.2024 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl H. Johansen, Hermann R. Samuelsen, Annika S. Biskopstø, Anfinn í Toft, Signhild V. Johannesen, Sylvia Thomsen, Jógvan Skorheim, Oddmar á Lakjuni, Eyðstein Ó. Poulsen, Fríðin Ziskason og Atli S. Justinussen
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 110/24 | 24/01315-1 | Val av borgarstjóra, býráðssetan 2025-2028 |
| 111/24 | 24/01314-1 | Skipan av valbólkum |
| 112/24 | 24/01316-1 | Val av 1. og 2. varaborgarstjóra, býráðssetan 2025-2028 |
| 113/24 | 24/01317-1 | Val av limum og tiltakslimum í fíggjarnevndina (FíN), býráðssetan 2025-2028 |
| 114/24 | 24/01321-1 | Val av limum og tiltakslimum í trivnaðarnevndina børn og ung (B&U), býráðssetan 2025-2028 |
| 115/24 | 24/01322-1 | Val av limum og tiltakslimum í trivnaðarnevndina eldri og bústaðir (E&B), býráðssetan 2025-2028 |
| 116/24 | 24/01324-1 | Val av limum og tiltakslimum í teknisku nevndina (TN), býráðssetan 2025-2028 |
| 117/24 | 24/01319-1 | Val av limum og tiltakslimum í umhvørvis- og býarskipanarnevndina (UBN), býráðssetan 2025-2028 |
| 118/24 | 24/01320-1 | Val av limum og tiltakslimum í mentanarnevndina (MeN), býráðssetan 2025-2028 |
| 119/24 | 24/01323-1 | Val av limum og tiltakslimum í havna- og vinnunevndina (HaVN), býráðssetan 2025-2028 |
| 120/24 | 24/01318-1 | Val av limum og tiltakslimum í heilsunevndina (HeiN), býráðssetan 2025-2028 |
| 121/24 | 24/01105-1 | Áseting av fundardøgum 2025 – Klaksvíkar býráð v.m. |

KLAKSVÍKAR KOMMUNA

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Til viðgerðar**

**110/24**
**24/01315-1 Val av borgarstjóra, býráðssetan 2025-2028**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 110/24 |

**24/01315-1 Val av borgarstjóra, býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Á kommunuvalinum 12. nov. 2024 vórðu hesir býráðslimir valdir í hesi raðfylgju:

1. Jógvan Skorheim
2. Karl H. Johansen
3. Oddmar á Lakjuni
4. Annika S. Biskopstø
5. Signhild V. Johannesen
6. Eyðstein Ó. Poulsen
7. Hermann R. Samuelsen
8. Fríðin Ziskason
9. Anfinn í Toft
10. Sylvia Thomsen
11. Atli S. Justinussen

Fyrstvaldi býráðslimurin, Jógvan Skorheim, setir fundin og lesur upp skriv frá valnevndini til býráðsval, har honum verður álagt at boða til fyrsta býráðsfund hjá nývalda býráðnum, sum er fyri tíðarskeiðið 1. januar 2025 til 31. desember 2028.

Val av borgarstjóra fyri valskeiðið 2025-2028
Sambært § 6 í kommunustýrislógini skal borgarstjórin veljast eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. § 2 er soljóðandi:

> **§ 2**. Við meirilutavali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær meir enn helmingin av atkvøðunum frá teimum, ið eru á fundi, er valt.
> *Stk. 2*. Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um.
> *Stk. 3*. Fær hvørgin teirra meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrstvaldi limurin fyri hesum lutakasti.

Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið sambært § 6, stk. 2.

**Lógargrundarlag:**
Kommunuvallógin, § 26, stk. 3
Kommunustýrislógin, §§ 2 og 6.

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja borgarstjóra fyri valskeiðið 2025-2028.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**
Samtykt at velja Karl H. Johansen til borgarstjóra við 6 atkvøðum fyri (KHJ, HRS, ASB, AíT, SVJ og ST), ongari atkvøðu ímóti og 5 blonkum atkvøðum (JS, OáL, EÓP, FZ og ASJ).

## 111/24
## 24/01314-1 Skipan av valbólkum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 111/24 |

**24/01314-1 Skipan av valbólkum**

**Frágreiðing um málið:**
Kommunustýrislógin ásetir í §§ 2 og 3, hvussu valhættirnir meirilutaval og lutfalsval eru skipaðir.

Við *meirilutavali* verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær meir enn helmingin av atkvøðunum frá teimum, ið eru á fundi, er valt.

Við *lutfalsvali* verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.

Limatalið í hvørjum valbólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør valbólkur kann velja sítt umboð. Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, §§ 2 og 3

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðslimum at boða borgarstjóranum frá valbólkum.

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**
Býráðið staðfesti, at talan er um tveir valbólkar, sum eru soleiðis mannaðir:
Meirilutin: Karl H. Johansen, Hermann R. Samuelsen, Annika S. Biskopstø, Anfinn í Toft, Signhild V. Johannesen og Sylvia Thomsen.
Minnilutin: Jógvan Skorheim, Oddmar á Lakjuni, Eyðstein Ó. Poulsen, Fríðin Ziskason og Atli S. Justinussen.

## 112/24
## 24/01316-1 Val av 1. og 2. varaborgarstjóra, býráðssetan 2025-2028

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 112/24 |

**24/01316-1 Val av 1. og 2. varaborgarstjóra, býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 6, stk. 3, 2. pkt. í kommunustýrislógini skulu borgarstjórin og varaborgarstjórin veljast eftir meirilutavalháttinum.

Men kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs ásetir í § 2, 1. petti, at valdir verða 1. og 2. varaborgarstjóri. Tá fer valið av 1. og 2. varaborgarstjóra sambært kommunustýrislógini, § 6, stk. 3, 4. pkt. fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3, ið er soljóðandi:

> **§ 3**. Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.
> *Stk. 2.* Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.
> *Stk. 3.* Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.

Val av 1. og 2. varaborgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið sambært § 6, stk. 3.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 6, stk. 3
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, § 2, 1. petti

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja 1. og 2. varaborgarstjóra fyri valskeiðið 2025-2028.

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**
Til 1. varaborgarstjóra er vald Annika S. Biskopstø.
Til 2. varaborgarstjóra er valdur Jógvan Skorheim.

## 113/24
## 24/01317-1 Val av limum og tiltakslimum í fíggjarnevndina (FíN), býráðssetan 2025-2028

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 113/24 |

**24/01317-1 Val av limum og tiltakslimum í fíggjarnevndina (FíN), býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært kommunustýrislógini er borgarstjórin formaður í fíggjarnevndini. Tí skulu í hesum føri veljast fýra limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fýra limir og fimm tiltakslimir í fíggjarnevndina afturat borgarstjóranum.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| 1. Karl H. Johansen | 1. Hermann R. Samuelsen |
| 2. Jógvan Skorheim | 2. Eyðstein Ó. Poulsen |
| 3. Anfinn í Toft | 3. Annika S. Biskopstø |
| 4. Oddmar á Lakjuni | 4. Fríðin Ziskason |
| 5. Signhild V. Johannesen | 5. Sylvia Thomsen |

## 114/24
## 24/01321-1 Val av limum og tiltakslimum í trivnaðarnevndina børn og ung (B&U), býráðssetan 2025-2028

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 114/24 |

**24/01321-1 Val av limum og tiltakslimum í trivnaðarnevndina børn og ung (B&U), býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er trivnaðarnevndin børn og ung ein føst nevnd, og sambært § 24 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 24

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í trivnaðarnevndina børn og ung.

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| 1. Annika S. Biskopstø | 1. Signhild V. Johannesen |
| 2. Eyðstein Ó. Poulsen | 2. Oddmar á Lakjuni |
| 3. Anfinn í Toft | 3. Sylvia Thomsen |
| 4. Atli S. Justinussen | 4. Jógvan Skorheim |
| 5. Hermann R. Samuelsen | 5. Signhild V. Johannesen |

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**115/24**
**24/01322-1 Val av limum og tiltakslimum í trivnaðarnevndina eldri og bústaðir (E&B), býráðssetan 2025-2028**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 115/24 |

**24/01322-1 Val av limum og tiltakslimum í trivnaðarnevndina eldri og bústaðir (E&B), býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir ein føst nevnd, og sambært § 25 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 25

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í trivnaðarnevndina eldri og bústaðir.

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| 1. Sylvia Thomsen | 1. Anfinn í Toft |
| 2. Atli S. Justinussen | 2. Eyðstein Ó. Poulsen |
| 3. Signhild V. Johannesen | 3. Hermann R. Samuelsen |
| 4. Fríðin Ziskason | 4. Oddmar á Lakjuni |
| 5. Annika S. Biskopstø | 5. Anfinn í Toft |

**116/24**
**24/01324-1 Val av limum og tiltakslimum í teknisku nevndina (TN), býráðssetan 2025-2028**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 116/24 |

**24/01324-1 Val av limum og tiltakslimum í teknisku nevndina (TN), býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.

*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er tekniska nevnd ein føst nevnd, og sambært § 26 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 26

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í teknisku nevnd.

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**

Limur:
1. Hermann R. Samuelsen
2. Oddmar á Lakjuni
3. Anfinn í Toft
4. Atli S. Justinussen
5. Sylvia Thomsen

Tiltakslimur:
1. Annika S. Biskopstø
2. Fríðin Ziskason
3. Signhild V. Johannesen
4. Eyðstein Ó. Poulsen
5. Annika S. Biskopstø

## 117/24
## 24/01319-1 Val av limum og tiltakslimum í umhvørvis- og býarskipanarnevndina (UBN), býráðssetan 2025-2028

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 117/24 |

**24/01319-1 Val av limum og tiltakslimum í umhvørvis- og býarskipanarnevndina (UBN), býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er umhvørvis- og býarskipanarnevndin ein føst nevnd, og sambært § 27 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 27

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í umhvørvis- og býarskipanarnevndina.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| 1. Anfinn í Toft | 1. Signhild V. Johannesen |
| 2. Jógvan Skorheim | 2. Oddmar á Lakjuni |
| 3. Hermann R. Samuelsen | 3. Sylvia Thomsen |
| 4. Eyðstein Ó. Poulsen | 4. Atli S. Justinussen |
| 5. Annika S. Biskopstø | 5. Signhild V. Johannesen |

## 118/24
## 24/01320-1 Val av limum og tiltakslimum í mentanarnevndina (MeN), býráðssetan 2025-2028

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 118/24 |

**24/01320-1 Val av limum og tiltakslimum í mentanarnevndina (MeN), býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er mentanarnevndin ein føst nevnd, og sambært § 28 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 28

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í mentanarnevndina.

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| 1. Signhild V. Johannesen | 1. Anfinn í Toft |
| 2. Atli S. Justinussen | 2. Jógvan Skorheim |
| 3. Annika S. Biskopstø | 3. Sylvia Thomsen |
| 4. Eyðstein Ó. Poulsen | 4. Fríðin Ziskason |
| 5. Hermann R. Samuelsen | 5. Anfinn í Toft |

## 119/24
## 24/01323-1 Val av limum og tiltakslimum í havna- og vinnunevndina (HaVN), býráðssetan 2025-2028

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 119/24 |

**24/01323-1 Val av limum og tiltakslimum í havna- og vinnunevndina (HaVN), býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

Sambært § 20 í kommunustýrisskipanini er havna- og vinnunevndin ein føst nevnd, og sambært § 29 skulu veljast fimm limir og fimm tiltakslimir.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, §§ 20 og 29

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja fimm limir og fimm tiltakslimir í havna- og vinnunevndina.

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| 1. Sylvia Thomsen | 1. Herman R. Samuelsen |
| 2. Fríðin Ziskason | 2. Atli S. Justinussen |
| 3. Anfinn í Toft | 3. Annika S. Biskopstø |
| 4. Oddmar á Lakjuni | 4. Jógvan Skorheim |
| 5. Signhild V. Johannesen | 5. Hermann R. Samuelsen |

## 120/24
## 24/01318-1 Val av limum og tiltakslimum í heilsunevndina (HeiN), býráðssetan 2025-2028

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 120/24 |

**24/01318-1 Val av limum og tiltakslimum í heilsunevndina (HeiN), býráðssetan 2025-2028**

**Frágreiðing um málið:**
Sambært § 28 í kommunustýrislógini skulu verða settar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.
*Stk. 3.* Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær.
*Stk. 4.* Verður avgjørt at velja nevnd av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA
Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Sambært § 43 í kommunustýrisskipanini er heilsunevndin ein faknevnd innan partar av málsøkjunum hjá føstu býráðsnevndunum, sum hon er undirnevnd hjá. Nevndin er mannað við trimum býráðslimum og verður vald á fyrsta býráðsfundi eftir hvørt býráðsval.

Hóast nevndin ikki er at meta sum ein av *føstu* nevndunum sambært kommunustýrisskipanini, verður mett hóskandi at velja limir og tiltakslimir longu á skipandi býráðsfundinum, tí nevndin - eins og føstu nevndirnar - hevur regluligar fundir, tá regluligu fundarumførini eru (sí § 47, 7. petti í kommunustýrisskipanini).

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin, § 28
Kommunustýrisskipan Klaksvíkar býráðs, § 43, 1. og 7. petti

**Tilmæli:**
Býráðið verður at velja tríggjar limir og tríggjar tiltakslimir í heilsunevndina.

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**

| Limur: | Tiltakslimur: |
|---|---|
| 1. Signhild V. Johannesen | 1. Annika S. Biskopstø |
| 2. Jógvan Skorheim | 2. Fríðin Ziskason |
| 3. Sylvia Thomsen | 3. Hermann R. Samuelsen |

## 121/24
## 24/01105-1 Áseting av fundardøgum 2025 – Klaksvíkar býráð v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.12.2024 | 121/24 |

**24/01105-1 Áseting av fundardøgum 2025 – Klaksvíkar býráð v.m.**

**Frágreiðing um málið:**
Býráðið skal við ársbyrjan almannakunngera, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.

Hesir fundardagar eru í uppskoti til býráðsfundirnar í 2025:

| | |
|---|---|
| 30. januar | 26. juni |
| 20. februar | 25. september |
| 20. mars | 30. oktober |
| 24. apríl | 27. november |
| 28. mai | 18. desember |

Fundir Klaksvíkar býráðs verða hildnir í mentanarhúsinum Varpið, Klaksvíksvegur 2, Klaksvík.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

*__§ 13.__ Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu fundardagarnar.

**Klaksvíkar Býráð 12. desember 2024:**
Einmælt samtykt at taka undir við teimum í tilmælinum, dagf. 06-12-2024, uppskotnu fundardøgunum fyri 2025.

*Fundurin lokin kl. 18:15*